# Frítíðartilboðið á Høgabóli – Samandráttur frá eftirlitinum

Frítíðartilboðið á Høgabóli er ætlað børnum við autismu, menningartarni, ADHD og downsyndromi, sum ganga í 3. til 10. flokk (í løtuni er eisini onkur, sum gongur í serbreyt á miðnámi). Høvuðsendamálið er at menna teirra sosialu, málsligu og sálarligu førleikar við einum skipaðum gerandisdegi.

**Ætlan og virkisætlan**
Ætlanir og virkisætlanir á Høgabóli eru væl skrivaðar. Tó vanta virkisætlanirnar møguliga at vera meira eins, og tað vantar ein støðugari kunning til foreldrini um virkisætlanirnar.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Arbeiðshættirnir eru lagaðir til tørvin hjá hvørjum einstøkum barni. Dentur verður lagdur á at skapa tryggar og skipaðar karmar, har bæði trivnaður og menning hava hægstu raðfesting. Tó vantar tilboðið eina meira greiða námsfrøðiliga høvuðsstevnu. Foreldur kundu hugsað sær meira kunning um, hvat hendir í gerandisdegnum.

**Trivnaður og menning hjá borgarum**
Børnini trívast sera væl og fáa jaligar og mennandi upplivingar, bæði við dagligum virksemi og útivirksemi. Dentur verður lagdur á sosiala og persónliga menning, sjálvbjargni og sjálvsálit. Bæði børn og foreldur siga frá einum sera tryggum og umsorganarfullum umhvørvi.

**Fakliga arbeiðið hjá starvsfólkunum**
Starvsfólkini hava viðkomandi førleikar og trívast væl. Tey arbeiða miðvíst við at tryggja jalig sambond og at viðurkenna hvønn einstakan.

**Leiðsla og organisatión**
Leiðslan er væl skipað og leggur stóran dent á opinleika, tryggleika og góðar samstarvshættir. Eindarleiðslan arbeiðir við felags námsfrøðiligum tilgongdum, og staðbundna leiðslan er sjónlig og stuðlar starvsfólkunum. Ymiskt er enn í menning, eitt nú innføring av KRAP (Kognitiv, Ressourcefokuseret og Anerkendende Praksis) og ‘skjalfest’-journalskipanin, men leiðslan hevur greiðar ætlanir og arbeiðir miðvíst ímóti hesum málum.

**Tilmælir og áheitanir frá eftirlitinum**
Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður til at ætlaða KRAP-háttalagið verður væl innført og at halda á við góða trivnaðinum – bæði millum børn og starvsfólk.*

*Mælt verður til at kunna foreldrini meira um, hvat hendir til dagligt. Her er ein talgild loysn uppløgd.*

> **Viðmerkingar frá Almannaverkinum**
> Viðvíkjandi tí talgildu loysnini, sum eftirlitið vísir á, so er frítíðartilboðið farið undir at royndarkoyra appina ”Intra”. Arbeitt verður við at fáa fígging til, at hetta verður útbygt.

*Eingin áheitan verður givin um, at nakað er kritiskt og skal fáast í rættlag beinanvegin.*